# Musikkskúla Miðnám

## Upptøkuroynd

**Tónleikaverk**

Umsøkjarin framførir tvey stykkir við ymiskum huglagi. Minst annað stykkið skal framførast við samanspæli.

Viðm. Skúlin útvegar ikki umsøkjarum klaverfylgispælara ella samanspælsbólk til upptøkuroyndina, men skúlin kann hjálpa umsøkjarum at finna ein.

**Prima vsita – secunda vista**

Prima vista roynd í blaðsangi (við hjálp frá klaverfylgispælara).

**Fyrisøgn**

Endurgeva (syngja) stutt løg og imitera klappaðar rytmur.

Viðm. *Vegleiðing til royndina*

1. Hugsa tær royndina sum eina musikalska heild – eina konsert – har sensorarnir eru áhoyrararnir.
2. Ger tað, sum tú dugir best innan karmar, sum tú kennir teg heima í.
3. Vel eitt torleikastig, sum ikki órógvar musikalska úrslitið.
4. Hugsa fjølbroytni viðvíkjandi tempo og dynamiskum eyðkenni.

# Lesiætlan

## Endamál

1. At menna og styrkja teknisku og musikalsku førleikar næmingsins so teir røkka einum støði, sum svarar til upptøkukrøvini til konservatorium.
2. At menna grundleggjandi førleikar næmingsins sum solistur og ensembletónleikari.
3. At næmingurin verður førur fyri at luttaka í og kennir seg heima í so breiðum parti av klassisku tónleikamentanini sum gjørligt bæði viðvíkjandi stíli og sjangru.

## Innihald

Við einum stílsligum fjølbroyttum og breiðum repertoire verður arbeitt við at menna førleikar næmingsins á økjum sum t.d.:

1. Musikalskur framburður
2. Imitatión
3. Teknikkur (fimi)
4. Klangskapan og -menning
5. Motorikkur og koordinatión
6. Nótalesing

**Repertoire** – dømi um tilfar, ið verður nýtt í undirvisingini

1. Schirmer's Library of Musical Classics: Twenty-Four Italian Songs and Arias of the Seventeenth and Eighteenth Centuries
2. Haydn: Canzonettas and Songs
3. Händel: 45 Arias from Operas and Oratorios for voice and piano
4. Schubert, Schumann, Franz, Brahms, Wolf, Mahler, Strauss: 50 German Songs for voice and piano
5. Ymiskt út sangleikum so sum: Phantom of the Opera, Sound of Music, Les Misérables, Chess, West Side Story, Jesus Christ Superstar o.fl.
6. Harafturat føroyskt og norðurlendskt klassiskt tilfar, eldri og nýtt.

# 1. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin framførir tvey ella fleiri stykkir (uttanat), sum eru ólík í lyndi og frá tveimum ella fleiri ymiskum tíðarskeiðum.

## Prima vista

Blaðsangur. Næmingurin fær 1-2 min. at fyrireika seg og syngur síðani eitt brot úr einum verki.

## Sangtekniskir førleikar

1. Næmingurin gevur eitt dømi av andadráttsvenjingum umframt eitt dømi av raddarvenjingum, ið eru hentar at duga í samband við upphiting av rødd og kroppi.
2. Næmingurin syngur arpeggios eftir egnum vali.
3. Næmingurin syngur strofur við ymiskum klangi, t.d. myrkt, ljóst og miðal og greiðir frá, hvussu mann broytir klangin.
4. Næmingurin syngur strofur og/ella tónar við vibrato, staccato, legato, melisma og luft á røddini.

## Tónastigar o.a.

Næmingurin syngur fylgjandi tónastigar (við solfa): Teir sjey kirkjutónaskalarnar – ioniski, doriski, frygiski, lydiski, mixolydiski, æoliski, lokriski.

# 2. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin framførir tvey ella fleiri stykkir (uttanat), sum eru ólík í lyndi og frá tveimum ella fleiri ymiskum tíðarskeiðum.

## Prima vista

Blaðsangur. Næmingurin fær 1-2 min. at fyrireika seg og syngur síðani eitt brot úr einum verki.

## Sangtekniskir førleikar

1. Næmingurin gevur eitt dømi av andadráttsvenjingum umframt eitt dømi av raddarvenjingum, ið eru hentar at duga í samband við upphiting av rødd og kroppi.
2. Næmingurin syngur arpeggios eftir egnum vali.
3. Næmingurin syngur strofur við ymiskum klangi, t.d. myrkt, ljóst og miðal og greiðir frá, hvussu mann broytir klangin.
4. Næmingurin syngur strofur og/ella tónar við vibrato, staccato, legato, melisma, luft á røddini og trills.

## Tónastigar

Næmingurin syngur fylgjandi tónastigar: Harmoniskur moll, jazz moll, melodiskur moll, blues, dur-pentaton, mol-pentaton, heiltóna- og kromatiskur tónastigi.

# 3. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin framførir trý ella fleiri stykkir (uttanat), sum eru ólík í lyndi og frá tveimum ella fleiri ymiskum tíðarskeiðum. Minst eitt stykki skal framførast a cappella.

## Prima vista

Blaðsangur. Næmingurin fær 1-2 min. at fyrireika seg og syngur síðani eitt brot úr einum verki.

## Sangtekniskir førleikar

1. Næmingurin gevur eitt dømi av andadráttsvenjingum umframt eitt dømi av raddarvenjingum, ið eru hentar at duga í samband við upphiting av rødd og kroppi.
2. Næmingurin syngur arpeggios eftir egnum vali.
3. Næmingurin syngur strofur við ymiskum klangi, t.d. myrkt, ljóst og miðal og greiðir frá, hvussu mann broytir klangin.
4. Næmingurin syngur strofur og/ella tónar við vibrato, staccato, legato, melisma, luft á røddini og trills.

## Tónastigar o.a.

Næmingurin syngur fylgjandi tónastigar (við solfa): Allar tónastigar frá 1., 2. og 3. ársroynd.